

*Høgni Lisberg feiraði Planetina á Oyrasundskollegiinum*

*Mynd: Símun Jóannesarson*

# Høgni Lisberg visti, at hann fór at vinna

**Í mun til flest øll hini, ið vunnu planetir á Planet Awards, var Høgni Lisberg als ikki yvirraskaður, sjampanjan var í køliskápinum. Tí Høgni visti, at hann fór at vinna, tað hevði hann vitað í einar 30 tímar, áðrenn restin av okkum vistu tað**

**PLANET**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg var tann einasti av teimum, ið vunnu planetir á Planet Awards, ið hevði meldað avboð. Ikki ein einasti av teimum, ið luttóku á fløguni Morning Dew var í Føroyum. Tá fyrireikararnir fríggjadag seinnapart skiltu, at besta fløgan ikki fór at vera umboðað, vóru góð ráð dýr. Tí varð avgjørt, at Høgni Lisberg skuldi sleppa at skriva eina heilsan, ið eitt umboð fyri plátufelagið TUTL kundið lesa upp. Tí varð ringt til lítilætna leirvíkingin, ið mundi dottið um av skelkinum.

Hann sigur við okkum, at hann als ikki hevði væntað at vunnið. Hann var miðskeiðis í síðstu viku í Føroyum, men við einum nýføðingi heima á Oyrasundkollegiinum, og skúlagongd í Danmark fór hann niður aftur hósdagin. Hann greiðir frá, at hann var sannførdur um, at 200 fór at vinna heiðurslønina, tí bólkurin hevur størstu fløgusøluna, umframt at teir eru øgiliga populerir. So hann fór aftur av landinum.

Høgni slapp at fortelja damuni Marjun og pápa sínum, ið vóru innið hjá honum, tá fyrireikararnir ringdu, at hann hevði vunnið. Men annars fekk eingin nakað at vita. Leygarkvøldið lurtaðu Høgni og eini 10-15 vinfólk eftir útvarpssendingini. Hann snýkti eina sjampanjufløsku við sær, legði hana í køliskápið og helt maskuni alt kvøldið.

Men í somu løtu sum Ginna Midjord hevði sagdi Mo... kom róp í, og tann einasti, ið ikki hoppaði og jublaði var Høgni. Hann noyddist tí at greiða hinum frá, at hann visti hetta frammanundan. Síðan bleiv veitsla, og saman við nógvum øðrum var sigurin feiraður í Sumpen á Oyrasundskollegiinm.

Høgni sigur, at hann er sera glaður um at hava fingið heiðurslønina. Ambitiónirnar røkka langt út um landoddarnar, men Føroyar er basan, tí er eitt tílíkt herðaklapp sera bekreftandi, sigur hann. Hann er eisini greiður yvir, at ein tílíkur prísur kann nýtast í marknaðarføringini uttanlanda. Hann hevur hoyrt frá nógvum í ídnaðinum, at tað er týdningarmikið at hava eina søgu at selja, og hetta er ein góð søga.

Høgni gav Morning Dew út 28. november, hetta er upp á dagin tveir mánaðar, áðrenn Planet Awards, um hetta mundið komu eini 15 útgávur út, tí hevði Høgni ikki ímynda sær, at hansara útgáva fór at hava gjørt nóg nógv vart við seg, til at vinna eina heiðursløn.